einfaldari

- ger tað einfaldari

Juli-august 2010


# Shino og Hallur til Nigeria



*Shino og Hallur Mortensen við dóttrini Kano* *Mynd: Tórvør Vang*

Sunnudagin 6. juni sendi samkoman Shino og Hallur Mortensen út sum trúboðarar til Nigeria.

Hallur, sum er hoyvíkingur, hevur lisið gudfrøði í Skotlandi í seks ár. Hann hevur eina bachelorgrad og tvær mastergradir. Fyri trimum árum síðan giftist hann Shino, sum er úr Japan. Hon hevur útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur.

Saman við dóttrini Kano fara tey nú til Afrika at tæna Harranum í Nigera. Tey skulu arbeiða á einum bíbliuskúla í býnum Ankpa. Skúlin er knýttur at felagsskapinum Mission Africa. Arbeiðið hjá felagsskapinum fevnir um gudfrøðiliga undirvísing, at stovna samkomur og at boða evangeliið.

Shino og Hallur hava bundið seg til at virka á skúlanum í tvey ár, men tey hava ætlanir um at vera longur. Tey heita á øll trúgvandi um at minnast tey í bøn. Eisini ber til at stuðla teimum fíggjarliga við at flyta pening á kontu nr. 6460-419.44.64. Teldupostadressan hjá teimum er: skarvur@gmail.com.


lívdin
– í livd hins hægsta

Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Kongalig vitjan

Vit hava júst havt kongaliga vitjan, nú Margreta drotning var í Føroyum. Innan vitjanina var alt á gosi, tí bygningar og vegir um alt landið skuldu verða so vøkur sum gjørligt. Nóg gott at taka ímóti eini drotning.

Vit merktu eisini kongaligu vitjanina í Lívdini, tí drotningin var og sá nýggja og sera prýðiliga Skúlan við Løgmannabreyt.

Í Matteus 25 lesa vit um eina aðra og nógv øðrvísi kongaliga vitjan. Tað er konganna Kongur, ið takkar sínum trúføstu tænarum – og hartar sínar ótrúgvu tænarar – fyri tað, tey gjørdu fyri hann, tá hann var í ringum skørum.

Ha … nær gjørdu vit alt hetta fyri konganna Kong??? "Tað, sum tit hava gjørt einum av hesum minstu brøðrum Mínum, hava tit gjørt Mær!" (vers 40).

So er spurningurin: Hvussu taka vit ímóti, og hvussu fara vit við konganna Kongi?



*Absalon Áargarð*

# Lívdin

### Guðrið fekk bræv úr Rumenia

Guðrið Thomsen fekk í apríl mánaði eitt bræv frá einari gentu í Rumenia. Gentan hevði fingið skógvaeskjuna, ið Guðrið hevði latið inn í sambandi við Christmas Child tiltakið. Gentan eitur Andrea Pæstu og er úr býnum Vaslui. Hon er 13 ára gomul, og tey eru 6 systkin.

Hon var sera glað fyri eskjuna, men mest av øllum at adressan var løgd í. Hon vónar ein dag at sleppa til Føroyar at vitja, ella at Guðrið kemur at vitja hana í Rumenia. Hon vónar eisini at tær báðar kunnu verða vinir og kunnu skriva saman.



*Guðrið við brævinum*
*Mynd: Tórvør Vang*



### Til lukku við hjúnabandinum

Leygardagin 26. juni giftust Anita Vinther Kjærbo og David Andrésen í Havn. Vígslan var í Ebenezer.

### Til lukku við barninum

20. apríl fingu Jastrid H. Sivertsen og Absalon Ø. Sivertsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3710 gr.



*Arkivmynd*

### Ungdómstiltøk í Lívdini og Oasuni

Í summarferiuni er ætlanin bert at hava ungdómstiltøk leygarkvøld, og tað verða Lívdin og Oasan, sum koma at hava tiltøkini. Meira fæst at vita á heimasíðuni: www.ung.livdin.fo



### Kunningarritið komið út aftur

Síðani á nýggjárinum er einki Kunningarrit komið út, men nú er avgjørt at royna at fáa tað regluliga út aftur. Tað eru Absalon Áargarð og Magnus Gunnarsson, ið taka sær av innihaldinum, meðan Tonny Brimsvík tekur sær av tekniska partinum.
Ætlanin er at fáa ritið út einaferð um vikuna, um nóg mikið av tilfari er til at senda út. Hevur tú okkurt til Kunningarritið, kanst tú maila hetta til: tidindi@livdin.fo

### Køksbønin stuðlar nýggja bygninginum

Køksbønin fæst nú til keyps í Lívdini í trimum ymiskum støddum, sum kosta ávikavist 15, 20 og 30 krónur. Tað er Astrid Mouritsen, sum ger hesar plakatir. Peningurin fer óskerdur til nýggja bygningin hjá Lívdini.




### Summarsteðgur

Eins og undanfarin ár verður summarsteðgur í Lívdini í summar. Eingi møtir verða í Skúlanum við Løgmannabreyt sunnudagarnar 25. juli, 1. august og 8. august.



*Hugnaløta í góðveðrinum sunnudagin 20. juni í Skúlanum við Løgmannabreyt*

## Tiltøk

### Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)
**Undirvísing og bøn eru týskvøld kl. 20.**

| | |
|---|---|
| **6. juli** | **Bønarmøti** |
| **13. juli** | **Einki møti** |
| **20. juli** | **Einki møti** |
| **27. juli** | **Einki møti** |
| **3. august** | **Einki møti** |
| **10. august** | **Einki møti** |
| **17. august** | **Einki møti** |
| **24. august** | **Bønarmøti** |
| **31. august** | **Kyknubólkar** |



# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 4. juli**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan: Tá reiðrið er tómt*
*Talari: Ólavur Jøkladal*


Ólavur

**Sunnudagin 11. juli**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Lovsongsmøti v. Annu Håberg*
*Bjarni Jøkladal hugleiðir*


Anna

**Sunnudagin 18. og 25. juli og 1. august**
*Einki møti: summarfrí*


Bjarni

**Sunnudagin 8. august**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan: Jesus kemur aftur*

**Sunnudagin 15. august**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Jóna Gunnarsson verður send út sum trúboðari*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Tit skulu verða vitni míni*
*Talari: Høgni Johannesen*


Jóna

**Sunnudagin 22. august**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan: Útlendingar giftir í Føroyum*
*Talari: Ilda Lómstein*


Ilda

**Sunnudagin 29. august**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Familjuløta*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan*
*Talari: Absalon Áargarð*


Høgni

**Undgdómstiltøk:**
Hyperlink: *fríggjakvøld kl. 21.00 (sí heimasíðuna: www.ung.livdin.fo)*
Alive: *leygarkvøld kl. 21.00 (sí heimasíðuna: www.ung.livdin.fo)*


Absalon

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*